*Oljuráðleggingarnevndin longu gjørt uppkast til løgtingslóg*

# Undirgrund og olja á tingborð



*Í álitinum frá Oljuráðleggingarnevndini er eisini tilmæli frá nevndini til landsstýrið um, at løgtingið leggur fram uppskot til løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya. Í álitinum er eisini uppkast til løgtingslóg og viðmerkingar. So hóast nevndin ikki hevur havt so nógv tíð til at gera hetta álitið hevur hon fingið væl burtur og hevur her ítøkiligt liðugt uppkast til eina løgtingslóg. Tilmælið frá nevndini er soljóðandi:*

**Tilmæli nevndarinnar til Føroya landsstýri.**

1. *Mælt verður til*, at løgtingið leggur fram uppskot til *løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya*. Uppkast nevndarinnar til lógaruppskot er hjálagt.

2. Eisini verður *mælt til*, at landsstýrið saman við lógaruppskotinum leggur fyri løgtingið uppskot til samtyktar um, at føroyingar hava í hyggju at lata upp fyri leiting eftir olju og jarðgassi, tá fyritreytirnar eru fingnar til vega. Tað er at siga, at arbeiðið við at fyrireika lóggávu og útgreiðingar heldur fram við tí í hyggju, at neyðturvilig lóggáva verður samtykt, og treytirnar fyri leiting og útvinning verða fastsettar. Harumframt, at forkanningar, ið væntast at verða framdar næstu árini av oljufeløgum og seismiskum fyritøkum, leggja trygt støði undir leiting eftir kolvetni á Føroyaleiðini. At enda verður samráðst m.a. við Stórabretland um mark við landgrunn Føroya, alt til tess at fáa greitt viðurskiftini soleiðis, at fortreytir verða fingnar fyri, at áhugað oljufeløg um nøkur ár kunnu vera við í fyrsta umfari av útboðum um loyvi til at leita eftir og vinna út olju og jarðgass. Í fyrireikingunum verður serstakur dentur lagdur á fyrilit fyri fiskiveiði okkara og royndir at skapa holla ávirkan á vinnubúskap og arbeiðsmøguleikar her á landi.

3. Við teirri treyt, at løgtingið samtykkir lóg um hetta, *verður tilmælt*, at landsstýrið við støði í uppkasti um lóg, sbr. 5. pkt., ásetir neyvari *reglur fyri at veita forkanningaloyvi*.

4. *Tilmælt verður*, at landsstýrið tekur avgerð um at evna til *fyrisitingarskipan fyri forkanningaloyvi o.a.m.* Neyðugt er, at landsstýrið longu nú kann fáa sær serkøna hjálp til at viðgera innkomnar áheitanir so hvørt, so at upplýsingar soleiðis fingnar og sambond soleiðis knýtt kunnu koma beinleiðis at gagni í fyrisitingini. Landsstýrið tekur í hesum sambandi støðu til, um nevndin umrødd í 5. pkt. og skrivstova hennara skulu vera við í fyrisitingarskipanini.

5. *Tilmælt* verður, at landsstýrið setur *serkøna nevnd* við tí fyrisetningi at gera uppskot um framtíðar kolvetnisfyriskipan, heruppií uppskot til

- ítøkilig stevnumið fyri at veita forkanningaloyvi, heruppií umhvørvisliga grundgivnar tilráðingar um at verja gýtingar- og smáfiskaleiðir, og um fráboðanarskipan til fiskimenn um seismikkvirksemi
- nýggja undirgrundarlóg
- almennar treytir fyri leitingar- og útvinningarloyvi
- avgerð um, hvørjar leiðir í fyrsta umfari ætlast at verða útboðnar
- lóg um arbeiðsumhvørvi, trygdar- og tilbúgvingarspurningar
- neyðugar skatta- og avgjaldsreglur
- ásetanir um at verja umhvørvis- og fiskiveiðiáhugamál
- greinargerð til løgtingið um møguleikar og framferð til at fremja føroyskan vinnubúskap og arbeiðsmøguleikar sum lið í føroyskum oljupolitikki.

## Oljuálit út til almenningin

*Landsstýrið lat í gjár fjølmiðlunum og harvið almenninginum drúgva og áhugaverda álitið frá Oljuráðleggingarnevndini um undirgrund og møguleikarnar at fara undir oljukanningar og møguliga oljuvinnu í Føroyum.*

*Sosialurin fer í komandi bløðum at hyggja nærri at álitinum og vónandi eisini at fáa viðmerkingar til tað. Í dag prenta vit nakrar partar úr álitinum*

**Amnesty International**
Skrivstovan í Vágsbotni er opin mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 11–16. Tlf. 15816.



**Sjálvtøkan**

Avgreiðslutíðirnar hjá sjálvtøkum bankans eru víðkaðar. Sjálvtøkurnar kunnu nú nýtast allar dagar í vikuni millum kl. 6⁰⁰ og 24⁰⁰.

Sjálvtøkur eru við deildirnar í Klaksvík, Saltangará og í Tórshavn við deildirnar í Miðbýnum og SMS.

FØROYA BANKI